# Ársfrágreiðing

# 2010

VÁGATUNNILIN

**5. apríl 2011**

# Frágreiðing
# til aðalfundin 5. apríl 2011
**(fyri árið 2010)**

## 1.Nevndin og felagið

Nevndin hevur í 2010 havt 6 fundir.

Á seinasta aðalfundi vóru allir 4 nevndarlimirnir afturvaldir. Í nevndina vóru afturvald Jens Kári Vilhelm, Dánjal T. Thomsen, Mathea Hilduberg og Marita Hentze. Nevndin skipaði seg við Jens Kára Vilhelm sum formanni og Dánjal T. Thomsen sum næstformanni.

Felagið hevur egna skrivstovu í leigaðum hølum á Skansavegi 7. Raksturin er skipaður í samstarvi við p/f Norðoyatunnilin, sum nýtir somu hølir, útgerð og starvsfólk. Millumroknað verður í mun til nýtsluna hjá hvørjum felagi sær.

Starvsfólkini hava í 2010 verið 6,5 í tali umframt stjóran. Við nevndarvirkseminum er samlaða innanhýsis virksemið hjá P/F Vágatunlinum uml. 8 ársverk. Allur tekniskur rakstur er lagdur í uttanhýsis rakstraravtalur.

Umsetningurin var í 2010 21,1 mió kr og er hetta 1,1 mió kr lægri enn fíggjarætlanin sum varð løgd fyri 2010. Í fíggjarætlanini fyri 2010 høvdu vit roknað við einum umsetningi á 22,2 mió. Úrslitið er eitt avlop á 0,4 mió kr sum er sama úrslit sum 2009. Av rakstrinum fóru 2,9 mió kr til rakstur av tunli og vegum, 2,2 mió kr til

innkrevjing og fyrisiting, 0,4  mió kr til tryggingar, 0,7 mó kr til el  og 14,5 mió kr til rentur og avskrivingar. Ársúrslitið gjørdist eitt avlop á 0,4  mió kr. sum er 1,5 mió kr betur enn tær metingar vit høvdu gjørt fyri 2010, tá roknað varð við einum halli á kr. 1,1 mió.

# 2. Virksemið

Endamálið hjá felagnum er smb. viðtøkunum, at útvega fast samband millum Streymoy og Vágoy, hava rakstur av fasta sambandinum um hendi umframt aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemið.

Í høvuðsheitum hevur arbeiðið fevnt um evnini, ið nærri eru lýst niðanfyri.

## 2.1 Tunnilsarbeiðið

Nógv av vanliga viðlíkahaldinum av tunlinum liggur í føstum skipanum, og tænastusáttmálar eru gjørdir við fleiri fyritøkur um ymsar tænastur, t.d. viðv. el-innstallatiónunum, pumpuskipanini, gjaldstøðini, reingerð av tunlinum, dagligt eftirlit í tunlinum v.m.

Í 2010 bleiv sáttmálin viðv. pumpuskipanini endurnýggjaður, og ein nýggjur sáttmáli bleiv gjørdur viðv. UPS-anlegginum.

Nýtt útbjóðingartilfar viðv. viðlíkahaldi av el-innstallatiónunum bleiv gjørt, og allar uppgávurnar blivu neyvt lýstar, fyri at kunna hava neyvari stýring við eykaarbeiðum, og hvat er umfatað av viðlíkahaldssáttmálanum. El-arbeiðið bleiv síðani bjóðað út, og tað vóru 12 fyritøkur, ið luttóku í undangóðkenningini, harav 5 fyritøkur vóru valdar út til at bjóða uppá arbeiðið. El-talvuvirkið í Gøtu hevði lægsta tilboðið fyri báðar tunlarnar, og ein 3-ára sáttmáli er gjørdur við fyritøkuna.

17. mars 2010 var ein stórvenjing í Vágatunlinum, har sløkkiliðini, løgreglan, ambulansatænastan, Landssjúkrahúsið og bjargingarfeløgini luttóku. Sum heild var venjingin væleydnað, tó vóru nakrir afturvendandi feilir, bæði viðv. tí tekniska og feilir frá innsatsleiðsluni. Í sambandi við venjingina bleiv øll tilbúgvingarætlanin endurskoðað og hon bleiv týdd frá donskum til føroyskt.

Pumpuverkið í Vágatunlinum hevur koyrt uttan trupulleikar. Høvuðseftirlit bleiv gjørt av tveimum pumpusettum í 2009, og høvuðseftirlit av tí triðja bleiv gjørt í 2010. Vatnnøgdin, sum verður pumpað úr tunlinum, hevur verið støðug, uml. 600 tons um samdøgrið, ella 416 litrar um min., sum er sama nøgd, sum tá tunnilin opnaði.

Ein afturvendandi trupulleiki er stýringarnar frá neyðstýriskápunum uttan fyri tunnilin, serliga stýringin av bummunum. Í løtuni verður arbeitt við at útskifta allar stýringarnar og el-deilirnar í bummunum.

Fyri at bøta um trygdina, tá koyrt verður, eru rumlufoyrur fresaðar eftir miðlinjuni gjøgnum tunnilin og til vegin oman á Oyrargjógv.

Í des. 2010 byrjaði arbeiðið at gera ábøtur á teknikplássini í tunlinum, og hetta arbeiði heldur fram í 2011. Bingjurnar, sum innihalda el-talvur v.m. eru byrjaðar at rusta, og tí verður í løtuni arbeitt við at seta dúk upp inni á 4 teknikplássum fyri at verja bingjurnar móti lekum frá loftinum.

Frá statusdegnum til í dag eru ikki hendingar, sum vit meta kunnu hava møguliga ávirkan á komandi ársroknskap.

## 2.2 Fígging

Íleggingargrunnurin fyri Føroyar veitir fígging til verkætlanina. Av fíggingini vóru við árslok 2010, kr. 42,1 mió. eftir at gjalda niður í mun til kr. 53,6 mill. ult. 2009 . Felagið hevur í árinum havt gott gjaldføri. Yvirskotsgjaldføri er partvís nýtt at gjalda inn á lánið, felagið hevur frá Íleggingargrunnin. Avtalað er við Íleggingargrunnin, at tað sum er goldið útyvir fastløgdu avdráttirnar, kann hevast aftur tá tørvur er á tí. Netto rentuútreiðslurnar hava verið 2,4 mill kr.

## 2.3 Ferðsla, nýtslugjald og gjaldstøð

Ferðslan hevur í 2010 verið í miðal 1591 bilar/samdøgur í mun til 1604 bilar/samdøgur árið fyri, ein minking á 0,9%.

Á myndini niðanfyri sæst, hvussu ferðslan er deild yvir árið og hvat miðalferðslan hevur verið einstøku mánaðirnar í 2007, 2008, 2009 og 2010.




Mynd 1. Miðalferðsla pr dag

Á myndini niðanfyri er víst index fyri ferðsluna síðani tunnilin lat upp, og hvussu gongdin í miðalgjaldinum fyri hvørt akfar hevur verið (2003 er sett til 100).




Mynd 2. Index fyri umsetning pr. akfar og fyri ferðslu

Gongdin vísur at samlaða ferðslan næstan stendur í stað í mun til árið fyri, men at tey íð gera nýtslu av tunlinum gjalda meira fyri hvønn túrin.

Samlaða ferðslan síðan tunnilin opnaði, tølini niðanfyri svara til mynd 3:

| Ár | Akfør |
|---|---|
| | |
| **2003** | 359.440 |
| **2004** | 375.958 |
| **2005** | 422.920 |
| **2006** | 524.992 |
| **2007** | 563.188 |
| **2008** | 576.956 |
| **2009** | 585.826 |
| **2010** | 580.750 |




Mynd 3. Tal av akførum, sum hava koyrt gjøgnum tunnilin frá 2003 til 2010.

Miðalprísurin, sum hvørt akfar hevur goldið, er undanfarin ár støðugt lækkaður, men hækkaði nakað í 2009 til kr. 77,5 og lækkaði so aftur í 2010 til kr. 72,75. Í 2008 var miðalprísurin kr. 75,14. Teir nevndu prísirnir eru teir, skuldskrivað verður tá koyrt verður framvið gjaldstøðina. Hetta gevur ein miðalprís í 2010 á kr. 36,38 hvønn vegin.




Mynd 4. Miðalgjald pr. akfar sum fer framvið gjaldstøðina.

Arbeitt verður áhaldandi við at betra innkrevjingina og gera hana meiri smidliga fyri kundarnar. Í maj mánaða 2010 er ætlanin at gera eina nøgdsemiskanning í samstarvi við Gallup.

Gjaldsskipanin er ein felags skipan við P/F Norðoyatunnilin, men er soleiðis háttað, at klárt mark er millum fíggjarligu viðurskiftini hjá feløgunum.

## 2.5 Heilsa, trygd og umhvørvi

Sum partur av støðuga arbeiðinum við at halda trygdina á einum høgum støði, verður tunnilin støðugt kannaður og hevur hetta ført til eitt ávíst viðlíkahaldsarbeiði. Fyri at darva ferðsluna sum minst og fyri at fasthalda trygdina, er gjørt av, at tá arbeitt verður á vegbreytini, verður tunnilin stongdur og arbeitt verður um náttina. Tó verða bilar leiddir gjøgnum tunnilin annanhvønn tíma.

Eitt krav frá myndugleikunum er at tilbúgvingarætlan fyriliggur. Tilbúgvingarætlanin er gjørd í samstarvi við allar partar sum kunnu hugsast at verða ein liður í hjálpararbeiðinum, um óhapp er í tunlinum. Tað verði seg sløkkilið, sjúkrahús, løgregla, Landsverk, Brunaumsjón Landsins o.o.

Sum nevnt frammanundan var ein stórvenjing í Vágatunlinum 17. mars 2010, har sløkkiliðini, løgreglan, ambulansatænastan, Landssjúkrahúsið og bjargingarfeløgini luttóku.

Eisini hava smærri venjingar verið í tunlinum, ið sløkkiliðini sjálv hava tikið stig til.

## 2.6 Frí ferðsla

Eins og undanfarin ár, vóru ársdagarnir fyri at Vágatunnilin og Norðoyatunnilin lótu upp fyri ferðslu, hátíðarhildnir við, at opið varð uttan at nýtslugjald var kravt. Umframt hetta vóru 2 dagar lagdir í samráð við vinnulívið í Vágum, sum á henda hátt kann nýta høvi at gera vart við seg. Framyvir eru hesir dagar lagdir í fasta rammu, soleiðis at ársdagarnar hjá ávikavist Vágatunlinum og Norðoyatunlinum kann koyrast uttan kostnað. Tó verða dagarnir lagdir til nærmasta leygardag. Harumframt er avtala gjørd við vinnuna/handilsfelagið um at tey gera av hvønn dag ókeypis er at koyra í fyrsta og triðja ársfjórðingi í árinum.

Íalt koyrdu 11.220 akfør teir dagar ókeypis varð at koyra í 2010, 11.608 í 2009, 10.984 í 2008 og 16.624 í 2007. Sostatt koyra meira enn tvífalt so nógvir bilar hesar dagar í mun til miðal pr. dag í árinum. Tær afturmeldingar vit fáa eru, at vinnan og áhugabólkar í Vágunum eru væl nøgd við hesar møguleikar, og verður nakað meira gjørt burturúr at skipað fyri serligum tiltøkum, eins og kunnleikin til tunnilin verður øktur.

## 2.7 Skipan av rakstri

Raksturin hjá felagnum er skipaður við innanhýsis virksemi - sum fevnir um leiðslu felagsins og innkrevjing av nýtslugjaldi, og við uttanhýsis tænastuavtalum, sum fevna um tekniska raksturin av tunlinum og gjaldstøðini.

Avtalað er við P/F Norðoyatunnilin um felags rakstur, útreiðslur verða býttar javnt millum feløgini, tó soleiðis, at serstakar útreiðslur, ið hoyra øðrum felagnum til, verða goldnar av hesum.

## 3. Mál av samfelags- og samfelagsbúskaparligum týdningi

Verkætlanin er løgd í eitt sjálvstøðugt partafelag, ið hevur endaligu fíggjarligu ábyrgdina.

## 4. Rakstraræltlan fyri komandi ár

Høvuðstølini í rakstraræltlanini fyri 2011 eru víst niðanfyri.

| **Rakstur** | **mió kr** |
|---|---|
| Umsetningur | 22,1 |
| Rakstur tunnil og vegir | -5,4 |
| Rakstur innkrevjing | -2,3 |
| **Úrslit áðrenn avskrivingar og fíggjarpostar** | 14,4 |
| Óvanligir postar | 0 |
| Av og niðurskrivingar tunnilsíløga | -12,2 |
| Fíggjarpostar | -1,8 |
| **Ársúrslit** | 0,4 |
| Av og niðurskrivingar tunnilsíløga | 12,1 |
| Avdráttur | 11,8 |
| **Likviditetsavlop** | 0,7 |

Bert smærri íløgur er gjørdar í 2010. Støðisognin er við árslok uml. 212 mió kr. Ávísar íløgur skulu væntast í 2011.

## 5. Niðurstøða

Samanumtikið kann staðfestast:

- at inntøkurnar hjá felagnum gjørdust nakað minni enn ætlað fyri 2010, men úrslitið gjørdist betur.
- prísbygnaðurin er eins fyri Vágatunnilin og Norðoyatunnilin
- prísurin at koyra gjøgnum tunnilin er óbroyttur

VÁGATUNNILIN P/F

Tórshavn 5. apríl  2011

| | |
|---|---|
| Jens Kári Vilhelm, formaður | Dánjal T. Thomsen, næstformaður |
| Mathea Hilduberg, nevndarlimur | Marita Hentze, nevndarlimur |
| | / Uni Danielsen, stjóri |